# Summarkapping 2008

LÝSINGARTILFAR


# Stokkhólm – ein býur á 14 oyggjum



**Junibacken, Skansen, Vasamuseet, skergarðsbátarnir og mangt mangt annað er tað ein fær ókeypis, um ein velur at keypa tað sokallaða "Stockholmskortet" tá ein vitjar svenska høvuðsstaðin Stokkholm**

Um ein vitjar Stokkholm fyri fyrstu ferð, er tað óivað nógv ein vil síggja í hesum søguliga og áhugaverda býi.

Stokkholm er, sum tann kongaligi høvuðstaður hann er, heimbýur hjá kongafamiljuni í Svøríki. Tí eru tað nógv kongalig slott og søvn ein kann vitja. Eitt nú Drottningholmsslott, sum varð bygt í 1600-talinum, og har kongafamiljan nú býr. Rundan um Drottningholm er ein sera vakur urtagarður í barokkstíli, og mitt í honum liggur eitt lítið ljósareytt slott, sum kallast "Kinaslott", sum forelskaði kongurin Adolf Fredrik bygdi til sína drotning ár 1750. Kinaslott er við á heimsarvslistanum hjá UNESCO.

Ein onnur drotning, ið eisini búði í Stokkholm, var bókmentadrotningin Astrid Lindgren. Hon búði næstan alt sítt lív í sentrala Stokkholm, og nakrar av bøkrum hennara sum "Karlsson á takinum" fekk hon íblástur til av stórbýarlívinum. Um ein ferðast við børnum í Stokkholm, er tað avbera stuttligt at fara til Junibacken og villast inn í heimin hjá Pippi, Emil, Madicken, Brøðurnar Leivuhjarta og øllum hinum, sum ein lesur um í bøkrunum hjá Astrid Lindgren.

Fyri at ferðast runt til hesi ymisku søvnini, kann ein velja millum buss, tok, bát ella sporvogn. Um ein hevur keypt "Stockholmskortet" er tað ókeypis at fara við øllum hesum.

Ein uppliving er at fara við báti í Stokkholm. Býurin er bygdur á 14 oyggjar, ið eru samanbundnar við 57 brúgvum. Um ein hevur keypt "Stockholmskortet" so kann ein velja at fara ein ókeypis túr antin rundanum oynna Djurgården ella oynna Kungsholmen.

Djurgården er ikki nakar rættuligur djóragarður, sum navnið sigur, men ein frítíðaroyggj við tivoli, søvnum, vøkrum urtagarðum og heimsins størsta uttandura savni, Skansen. Á Djurgården eru bara nøkur fá bústaðarhús, tí oyggin mest verður brúkt sum frítíðardepil fyri ferðafólk og stokkholmarar, ið vilja út at njóta náttúruna mitt í býnum.

Á Skansen eru gomul hús úr øllum Svøríki savnaði og summartíð eru eisini fólk í teimum, sum gera tað ein gjørdi fyrr í tíðini.

Undir liðini á Skansanum er eisini eitt stórt tivoli "Grøna Lund" og gongur ein ein stuttan túr eru søvnini Vasamuseet og Aquaria eisini verd eina vitjan.

Samanlagt eru tað heili 75 søvn ein kann vitja um ein keypur Stokkholmskortið. Ein kann eisini velja, hvussu nógvar tímar kortið skal verða galdandi - 24, 48 ella 72 tímar.

At vitja heili 75 søvn er nokk eitt sindur ov nógv fyri tey flestu av okkum, men um ein vil fáa nógv áhugavert við í Stokkholm, er tað eitt gott hugskot at fara út á Djurgården og spáka runt á teimum ymisku søvnunum.

Adressa:
www.stockholmtown.com

## Puntur nr. 15







www.sansir.fo

Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR - so ert tú tryggari